VB-Kyndil 31-27 (18-15):

# Fingu hevnd

**VB vann seg ájavnt við Neistan í stigum, tá tær á heimavølli fingu tap fyri greiða tapið fyri Kyndli í grundspælinum**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Aðru ferð innan tveir dagar skuldi VB spæla heimadyst, tá tær sunnudagin fingu vitjan av Kyndli.

Einki var at ivast í, at VB var favorittur til dystin, og dysturin skuldi eisini vinnast, um VB framhaldandi skuldi fylgja við í bronsustríðnum. Hinvegin mundi tað eisini sita fast í høvdinum, at júst Kyndil hevði verið ein alt ov stórur biti seinna dystin í grundspælinum, tá tær grønu á heimavølli vundu burtur úr VB.

### Vendi eftir time-out

Tað var eisini líkt til, at Kyndil aftur hesa ferð skuldi geva VB ein skarpan gang, tá farið varð undir dystin sunnudagin.

VB, sum hevði splt hálvfinalu í steypakappingini dagin fyri, hevði fyrstu løtuna sera ilt við at fóta sær, og spakuliga tók Kyndil at draga frá mótstøðuni.

Munurin varð tó ikki tann stóri. Eini tvey mál ella so. Men hetta broyttist, eftir at Kyndil miðskeiðis í fyrra hálvleiki tók sær eitt time-out.

Heldur enn at hjálpa gestunum, so vóru tað tær á heimaliðnum, sum fingu fyrimun av hesum, og eftir lítlari løtu høvdu tær vent øllum á, soleiðis at tað nú vóru tær, sum hildu segn frammanfyri.

Tað gjørdu tær eisini restina av dystinum, men tað var tó ikki uttan stríð. Kyndil hekk alla tíðina fast, og serstakliga fyrstu løtuna eftir steðgin hóttu tær fleiri ferðir við at taka VB aftur, uttan at hetta tó eydnaðist teimum.

Avgerandi løtan kom um miðjan hálvleikin, eftir at Kyndil enn eina ferð hevði strítt seg upp, so bert eitt mál var á muni. VB fekk tá fýra mál á rað, og eftir hetta fekk Kyndil ikki hildið hótt mótstøðuna stórvegis. Seinastu tíggju minuttirnar ráddi mest um at koyra sigurin heim hjá VB, og hetta gjørdu tær eisini uttan stórvegis slingur í valsinum.

### Stjørnan er lykilin

Sigurin hjá VB saman við tapinum hjá Neistanum merkti, at tað nú aftur er javnstøða í dystinum í triðja plássið í kappingini.

Her hevur Neistin tó tann fyrimun, at tær longu hava spælt annan dystin móti VÍF, soleiðis at tær her hava tryggjað sær, at VB fer at missa tvey stig, har Neistin ikki kann missa fleiri.

Tað tykist tó, sum um tað verða dystirnir móti Stjørnuni, sum fara at verða avgerandi fyri, hvar bronsan fer. Hóast VB skuldi vunnið seinna dystin á Neistanum, so kann Neistin hava ein avgerandi fyrimun í málmuninum, og tískil verður helst neyðugt hjá VB at vinna stig frá klaksvíkingunum. Hetta skuldi tó ikki verið ógjørligt, og millum annað prógvaði VB í grundspælinum, at hetta væl kann lata seg gera, men hinvegin hevur Neistin eisini hendan møguleikan.



*Hóast 14 mál frá Anniku Ljósstein, so eydnaðist ikki Kyndli at endurtaka sigurin á VB*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Dysturin í tølum**
**VB-Kyndil 31-27 (18-15)**
Málskjúttar:
VB: Regina Radó 8(2), Gurið Mortensen 7, Gabriella Fekete 5(3), Leila Jespersen 4, Eyðbritt Krosslá 2, Sólrun Krosslá 2, Rannvá Augustinussen 1, Margreth Augustinussen 1, Durita Rouch 1
Kyndil: Annika Ljósstein 14, Lotte Sørensen 5(2), Anja Johannesen 3, Ann-Mari Wang 2, Marjun Tróndarson 1, Palma Petersen 1
Brotskøst: VB 7, Kyndil 3
Útvísingar: VB 2, Kyndil 5
Diskvalifikatión: Kyndil 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr TB: Birgir Dimon & Kári Niclasen.

StÍF-Tjaldur 32-24 (19-10):

# Nú er ferð komin á

**Strandingar tykjast veruliga hava tikið dik á seg í endaspælinum. Sunnudagin vunnu teir trygt í lokaluppgerðini móti Tjaldri**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Eitt hitt mest óstøðuga liðið í grundspælinum hjá monnum var uttan iva StÍF. Avrikini sveiggjaðu millum tað frálíka og tað vánaliga, og millum annað leiktu teir innan tríggjar dystir tveir sera javnar dystir móti Neistanum og VÍF, fyri síðani at tapa fyri Tjaldri, sum fram til tá als ikki hevði vunnið nakað sum helst.

### Spenningurin hvarv

Tí hevði tað eisini nakað við hevnd at gera, tá Tjaldur vitjaði sunnudagin, umframt tann spenning, sum altíð er í eini lokaluppgerð.

Tað var tó ikki so leingi, at talan var um veruligan spenning sunnudagin. Fyrstu løtuna hekk Tjaldur so hampuliga væl í, men so settu strandingar ferð á. Við spælinum, sum eitt nú vestmenningar hava kent sviðan av, tóku teir seg alt meira frá gestunum, sum bert fingu bóltin í málið tríggjar ferðir seinastu 20 minuttirnar undan steðginum. Í sama tíðarbili skeyt heimaliðið ikki færri enn 11 mál, og so var kósin sett.

Í seinna hálvleiki helt StÍF bara á fram við málsókna spælinum. Tjaldursmenn vóru snøgt sagt um ein háls. Fingu einki at hanga saman. Alt meðan heimaliðið bara økti meira og meira um leiðsluna. Ikki fyrr enn seinastu tíggju minuttirnar varð ferðin sett niður á eitt støði, har gestirnir kundu fylgja við, men tá var alt langt síðani avgjørt.

### Bronsan og steypið

Umframt at økja um munin niður til hoyvíkingar á fjórða plássinum, so tóktist avrikið hjá StÍF at prógva, at teir nú fara at gera álvara av ætlanunum um at taka heiðursmerki aftur í ár.

Talan verður neyvan um meira enn bronsumerkini, hóast tað enn eru nógv stig eftir at spæla um, men meira enn hetta, so munnu leikararnir nú hugsa um steypakappingina, har liðið longu hevur bast VÍF einaferð.

Mikukvøldið skulu teir Vestmanna at verja fýra mála leiðsluna, sum teir vunnu sær í fyrru hálvfinalu, og við spælinum síðani jólasteðgin í huganum, so skal als ikki útilokast, at StÍF aftur hesa ferð ger ein vørr móti VÍF. Í fjør prógvaði liðið, at hóast teir ikki stóðu seg til gull í landskappingini, so hevur liðið neyðugu dygdirnar til at vinna á teimum bestu, og megna tey aftur í ár at tryggja sær steypið, so man tað ikki vera so galið kortini.



*Strandingar tykjast veruliga hava fingið ferð á, og hóast hetta neyvan røkkur til meira enn bronsuna, so hava teir eisini steypakappigina at stríðast fyri*

**Dysturin í tølum**
**StÍF-Tjaldur 32-24 (19-10)**
Málskjúttar:
StÍF: Artur Johansen 6(2), Costin Dumitrescu 6(2), Alæexandur Johansen 5, Bent Djurhuus 4, Marius Joensen 4, Sveinur Justinussen 2(1), Anfinnur Joensen 2, Andre F. Danielsen 2, Jón Rasmussen 1
Tjaldur: Dragisa Stojovic 5, Sverri Justinussen 5, Mortan Hansen 4(1), Zoran Sarcevic 3, Ken Bærendsen 2, Tummas Magnussen 2(1), Svein í Heiðunum 1, Tórhallur Thomsen 1, Johnny Lamhauge 1
Brotskøst: StÍF 5, Tjaldur 4
Útvísingar: StÍF 3, Tjaldur 6
Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum & Hannis Wardum



VB-Stjørnan 22-24 (7-10):

# Stjørnan í finaluni

**Stjørnan úr Klaksvík gjørdist fyrsti finaluluttakarin í Coca-Cola kappingini, tá tær eisini vunnu seinna hálvfinaludystin ímóti VB**

COCA-COLA KAPPINGIN – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Eftir at tær í fyrra dystinum høvdu vunnið 27-23 á VB, var tað fullkomuliga upp til Stjørnuna, um tær fyri fyrstu ferð í trý ár skuldu tryggja sær sess í steypafinaluni.

Alt annað enn eitt tap upp á fýra mál ella meira sendi tær beint í steypafinaluna, og við hesum sum barlast fóru tær á vøllin í VB-høllini.

### Eingin vandi

Tað skuldi skjótt vísa seg, at tað ikki var stórvegis vandi fyri, at Stjørnan skuldi missa leiðsluna hendan dagin.

Frá fyrsta bríksli vóru tað tær, sum vóru við yvirlutan, og tó at munurin ikki var hin stóri, so tók tað so spakuliga at dragna millum liðini. Ikki minst tí Stjørnan fekk nógv betri gongd á týdningarmikla vongspælið enn VB, sum eisini hevur hendan partin av spælinum sum eina av avgjørdu sterku síðunum.

Í seinna hálvleiki tóktist góða gongdin hjá gestunum bara at standa við. Við fullari ferð runnu tær nú frá VB, og tá munurin var størstur, var hann heili seks mál. Seinastu korterið ella so eydnaðist tó VB at minka nakað um munin, men meira enn kosmetiskan týdning fekk hetta ongantíð. Stjørnan hevði endiliga tryggjað sær finalusessin, sum tær ætlaðu sær bæði í fjør og fyrraárið, og so er spurningurin, hvussu tað fer at hilnast, tá tær eftir øllum at døma skulu royna seg móti VÍF í finaluni.

### Áhugaverd finala

Uttan at taka nakað frá VB, sum tvey ár á rað hevur verið í finaluni, so má tað fyri spenningin sigast at vera gott, at Stjørnan nú er í finaluni.

Hóast VÍF sjálvsagt eru stórfavorittar í øllum heimligum dystum, so er tað tó Stjørnan, sum hevur givið teimum dyggastu mótstøðuna tey bæði seinnu árini, og báðu ferðirnar liðini hittust í grundspælinum, var talan um hampuliga javnar dystir.

Tá talan so eisini er um eina steypafinalu, so plagar at verða tikið til, at alt kann henda, og í Klaksvík síggja tey helst hetta sum størsta møguleikan á árinum at taka VÍF. Hvørt hetta fer at eydnast, er so ein heilt onnur søga.

**Dysturin í tølum:**
VB-Stjørnan 22-24 (7-10). Stjørnan víðari við samanlagt 51-45
**Málskjúttar:**
**VB:** Gabriella Fekete 5(2), Leila Jespersen 5, Gurið Mortensen 4, Regina Radó 4(1), Eyðbritt Krosslá 2, Durita Rouch 1, Sólrun Krosslá 1
**Stjørnan:** Andrijana Milodanovic 8, Simona Dziugyte 6(4), Joan M. Joensen 4(1), Bára Skaale 3, Anna Kristina Samsons2, Jastrid Gullaksen 1
**Brotskøst:** VB 3, Stjørnan 5
**Útvísingar:** VB 1, Stjørnan 3
**Dómarar úr VB/TB:** Egill Steintórsson & Birgir Dimon.

# Todi á veingin

**Gitt verður, at FCK nú fer at spæla við trimum áleyparum, og at Todi verður ein av hesum**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Í Danmark eru feløgini farin undir venjingarnar til seinnu kappingarhálvu, og fyri Toda Jónsson merkir hetta – eins og fyri aðrar leikarar- at jólafrítíðin nú er liðug.

Hjá Toda, sum fekk mest sum alla fyrru hálvu oyðilagda av skaðum, man tað vera eitt sindur øðrvísi at koma til venjing nú, tí fleiri av fyrrverandi liðfeløgum hansara hava nýtt steðgin til at skifta felag, meðan aðrir tykjast vera á veg til útlandið.

### Tríggir á toppin

Talan hevur tó eisini verið um tilgongd hjá Toda og teimum. Fyrst og fremst við keypunum av norska Erik Mykland og Martin Albrechtsen úr AB.

Hesir eru ikki at rokna sum beinleiðis kappingarneytar til Toda, men gitt verður kortini, at Hans Backe fer at blanda kortini eitt sindur øðrvísi í vár, enn hann gjørdi í fjør.

Tó at stórar broytingar eru farnar fram í verjupartinum, so verða tað helst framhaldandi fýra mans í hesari, men stórur broytingarnar skulu finnast longur frammi á vøllinum.

Har sigst Backe hava ætlanir um at spæla við trimum áleyparum. T.v.s við tveimum veruligum vongspælarum og einum góðum gamaldags centerforward. Fyri Toda betrar hetta uttan iva um útlitini fyri at vinna sær pláss aftur á liðnum, tí meðan hann hevur verið skaddur, er kappingin um álopssessirnar harðnað við keypinum av Peter Møller.

Nú verður roknað við, at Møller og Fernandez fara at stríðast um sessin mitt í álopinum, meðan Todi og Zuma eru favorittar til sessirnar á vengrunum tó at Carsten Fredgaard og Morten Bisgaard helst fara at geva teimum kapping í hesum.

Í øllum førum tykist hetta kunna gerast ein spennandi blanding hjá FCK-venjaranum. Tikið verður ofta til, at tað í Danmark eru fáir leikarar, sum kunnu meira einsamallir enn Todi og Zuma, og við einum stórum Peter Møller ella einum sníkjandi Fernandez at taka ímóti, er als ikki óhugsandi, at FCK nú fer at geva Brøndby harðari kapping, enn teir fingu í heystarhálvuni.

*Saman við liðfeløgunum er Todi nú aftur farin undir venjingarnar, og nú tykist ætlanin vera, at FCK skal á flog við Toda og Zuma á hvør sínum veingi*



# Julian skeyt Hull úr kreppuni

**Føroyski miðvallarin var á blettinum, tá Hull vann fyri fyrstu ferð í átta dystir**

ONGLAND
*Jákup Mørk*

Sum nevnt í leygardagsblað okkara, so stóð heilt nógv á hjá Julian Johnsson og liðfeløgunum í Hull undan vikuskiftinum.

Sjey dystir á rað uttan sigur høvdu sent liðið langt afturum tey bæði oddaliðini, og skuldi Hull ikki missa sambandið við tríggja beinleiðis uppflytingarsessin, so var alneyðugt við einum sigri, tá Exeter vitjaði leygardagin.

### Á talvuna

Tað eydnaðist eisini Hull at vinna dystin 2-0, og tað var eingin annar enn Julian, sum gjørdist stóra hetjan. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki fluktaði føroyingurin bóltin í kassan úr stuttari fjarstøðu til 1-0.

Hetta var næsta málið hjá Julian í ár, og sum skilst í ensku miðlunum, so var hetta eisini heilt í tráð við spælbýtið fram til tá.

Hull hevði eisini yvirvág, tá sum eftir var av dystinum, men tað gekk tó rúm tíð, áðrenn teir kundu kenna seg tryggar. Exeter royndi at standa ímóti, men tá toppskjuttin hjá Hull, Graham Alexander, miðskeiðis í seinna hálvleiki skeyt sitt 20. mál hetta kappingarárið, var leyst og liðugt hjá Hull.

Eisini hini liðini í oddinum vunnu sínar dystir, so sigurin førdi ikki Hull nærri uppflytanini, men sálarligi týdningurin av sigrinum kann neyvan undirmetast.



*Julian Johnsson stóð fyri fyrsta málinum, tá Hull fyri fyrstu ferð í átta dystir fekk ein sigur*

## Enska 3. deild

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 27 | 16 | 7 | 4 | 38 | 18 | 20 | 55 |
| 2 | Luton | 28 | 16 | 6 | 6 | 55 | 35 | 20 | 54 |
| 3 | Mansfield | 26 | 14 | 5 | 7 | 41 | 27 | 14 | 47 |
| 4 | Shrewsbury | 29 | 13 | 7 | 9 | 41 | 2 | 9 | 46 |
| 5 | Hull C. | 27 | 12 | 8 | 7 | 39 | 27 | 12 | 44 |
| 6 | Rochdale | 26 | 12 | 8 | 6 | 36 | 28 | 8 | 44 |
| 7 | Cheltenham | 27 | 11 | 10 | 6 | 40 | 34 | 6 | 43 |
| 8 | Scunthorpe | 27 | 11 | 9 | 7 | 47 | 33 | 14 | 42 |
| 9 | Kidderm. | 27 | 12 | 5 | 10 | 33 | 27 | 6 | 41 |
| 10 | R&D | 27 | 10 | 9 | 8 | 35 | 29 | 6 | 39 |
| 11 | Exeter | 28 | 10 | 8 | 10 | 31 | 44 | -13 | 38 |
| 12 | Southend | 27 | 10 | 5 | 12 | 32 | 32 | 0 | 35 |
| 13 | Hartlepool | 26 | 9 | 6 | 11 | 33 | 28 | 5 | 33 |
| 14 | Oxford Utd. | 28 | 8 | 9 | 11 | 36 | 36 | 0 | 33 |
| 15 | Swansea | 28 | 8 | 8 | 12 | 34 | 40 | -6 | 32 |
| 16 | Bristol R. | 27 | 8 | 7 | 12 | 25 | 33 | -8 | 31 |
| 17 | Darlington | 25 | 8 | 6 | 11 | 29 | 35 | -6 | 30 |
| 18 | Macclesfield | 27 | 7 | 9 | 11 | 24 | 33 | -9 | 30 |
| 19 | Leyton O. | 27 | 8 | 6 | 13 | 39 | 49 | -10 | 30 |
| 20 | Lincoln C. | 27 | 6 | 11 | 10 | 27 | 37 | -10 | 29 |
| 21 | Torquay | 28 | 7 | 7 | 14 | 25 | 43 | -18 | 28 |
| 22 | Carlisle | 25 | 6 | 8 | 11 | 27 | 32 | -5 | 26 |
| 23 | York | 25 | 6 | 6 | 13 | 28 | 45 | -17 | 24 |
| 24 | Halifax | 26 | 5 | 9 | 12 | 21 | 39 | -18 | 24 |

**Føroyskir leikarar:** Julian Johnsson (Hull C.)